*bandsflokkurin stendur í hesum spurningi?*

- Sum tú ivaleyst hevur bitið merki í, so hevur Sambandsflokkurin verið við til at framt fleiri yvirtøkur. Og hann hevur sagt seg sinnaðan at vera við til at fremja fleiri, tá ið tíðin er búgvin til tað. So longu har hevur tú partvíst eitt svar. Tú kanst ikki vera fyri at fremja yvirtøkur, uttan at tú ert til reiðar at góðtaka minking í heildarveitingini úr Danmark. Eg kann sjálvandi ikki siga, at eingin sambandsmaður er, ið er ímóti eini og hvørjari skerjing í blokkinum til eina og hvørja tíð. Men eg tori at siga, at 80-90 prosent av sambandsveljarum taka undir við tí, eg her sigi. Men far ikki skeivur av hesum: Vit leggja stóran dent á, at blokkurin úr Danmark - saman við okkara egnu framleiðslu – heldur okkum uppi á einum vælferðarstøði, ið ikki liggur aftanfyri tey fremstu londini í heiminum. Tí venda vit okkum ímóti teimum, sum prædika, at blokkurin er til skaða fyri samfelagið og tí má fáast burtur ongantíð ov skjótt. Men sum eg segði, so er tað ikki júst hatta, vit leggja mestan dent á, tá ið vit tosa um ríkisfelagsskapin í okkara stevnuskrá. Sum eg segði í áðni, so meta vit ríkisfelagsskapin sum eitt amboð. Eitt amboð vit skulu brúka til at menna okkara samfelag, ikki minst vinnuliga og fíggjarliga. Ríkisfelagsskapurin skal hjálpa okkum til at fáa eitt sterkari og meira fjøltáttað vinnulív. Millum annað við at fáa okkum betri sømdir mótvegis ES. Og eisini – her kemur ES aftur inn í myndina – eisini til at styrkja gransking í Føroyum. Hesi trý – vit kunnu nevna tað tær tríggjar súlurnar undir føroyskari vælferð – Ríkisfelagsskapurin, atlimaskapur í ES og ein skilagóður vinnupolitikkur eru tað, eg meini má vera tað, ið tryggjar, at Føroyar framhaldandi vera eitt framkomið samfelag við eini vælferð á hægsta støði. Eydnast tað at fáa hesi trý at virka saman, so vit fáa eitt vinnulív, ið verður ført at taka av teimum stóru avbjóðingunum, ið globaliseringin setur okkum, ja so verða vit eisini fíggjarliga sjálvbjargin. Tá kunnu vit – uttan at forkoma vælferðini – minka um pengastreymin úr Danmark. Men, sum eg sigi: Vit mugu vera sjálvbjargin fyrst. Fíggjarliga sjálvbjargin.

*Spyrjari: Nú komst tú sjálvur inn á ES-málið. Sambandsflokkurin er í nógvar mátar ein dupultur sambandsflokkur. Fyri sambandi við Danmark. Og fyri sambandi við ES.*

- Ja, vit síggja ein kláran parallell í hesum. Og samstundis ein einastandandi møguleika, sum allir flokkar áttu at kunna verið samdir um. Danmark er í einum ríkisfelagsskapi, sum hevur havt ein ómetaliga stóran týdning fyri tey. Og vit eru í ríkisfelagsskapi við Danmark. Her er tað so, at vit meina, at Føroyar eiga at kunna fáa danir at brúka danska limaskapin at fáa okkum at-limaskap við sømdum, ið minna um tær, ið Áland hevur fingið.

*Spyrjari: Trýrt tú sjálvur hasum? Tá ið tit tosa um at biðja ES um samráðingar, so hevur tú beinanvegin tvídráttin millum heimastýrisflokkar og fullveldisflokkar: Skulu Føroyar samráðast sum part av Danmark, ella skulu Føroyar biðja um limaskap sum suverent land?*

- Tað eigur ikki at verða sett so hart upp ímóti hvørjum øðrum. Vit sóu millum annað, at meðan Fullveldis-landsstýrið sat, so mátti ES-spurningurin ikki nevnast, tí okkara viðurskifti við Danmark skuldu greiðast fyrst. Tað er púra óneyðugt. Tað ber væl til at fáa okkara samfelagi, tað vil siga bæði vinnulívi og borgarum, nógv betri sømdir við ES ella innan fyri ES, uttan at tað upp á nakran sum helst máta forðar nøkrum í seinni at taka stig á fullveldisleið, um tað er tað fólk vilja. Eg vil heldur siga, at tað er fortreytin fyri fíggjarliga sjálvbjargninum, sum má til, áðrenn fullveldi kann verða aktuelt. So um politikarar í hinum flokkunum tora at vera opnir fyri møguleikunum, so átti at borið til at fingið eina pragmatiska semju í ES-spurninginum. Eg vildi mælt til, at vit settu okkum fyri at hava tvær fólkaatkvøður í hesum báðum spurningunum, so vit miðvíst fingu eina politiska avkláring. Eina um ES-atlimaskap í 2010. Og síðani eina um okkara støðu í ríkisfelagsskapinum í 2012.

*Spyrjari: Har er eisini ein annar knútur, sum hevur verið fremsta orsøk til, at føroyingar hava verið so negativir til ES-limaskap: Fiskurin rundan um Føroyar og fiskimarkið. Er tað ikki ein andsøgn, at tit millum annað í stevnuskránni hálova hetta tilfeingi og týdningin, tað hevur fyri føroyska búskapin, og so tað, at tit risikera, at útlendsk fiskiskip aftur koma inn á føroysku leiðirnar.*

- Tað er ikki vist, at so verður. Tað mugu samráðingar til, áðrenn vit vita tað. Men spurningurin er, um vit ikki hava hug at stara okkum blind upp á tað, vit møguliga missa, og gloyma heilt, at vit eisini kunnu vinna okkara fiskivinnu atgongd til fiskileiðir, vit ikki hava í dag. Her er tað, at vit siga, at tú mást vera ein sannur liberalistur. Sambandsflokkurin er ein liberalur flokkur og kann tí taka undir við teimum fýra frælsunum hjá ES. Frælsið hjá kapitali, arbeiðsmegi, tænastum og vørum at kunna fara frítt um landamørk innan fyri felagsskapin.

*Spyrjari: Tað vil siga, at tit stúra ikki fyri at lova útlendskum fiskiskipum inn aftur á okkara fiskileiðir, bara vit fáa somu rættindi hjá ES-londunum. – Er tað sama galdandi, tá ið tað kemur til kapital og arbeiðsmegi? Skulu allar avmarkingar hjá ES-borgarum takast burtur, tá ið tað snýr seg um at kunna keypa seg inn í føroyskt vinnulív ella at kunna koma higar at arbeiða og búgva?*

- Ja og ja. Allar sovorðnar forðingar mugu burtur, so vit kunnu fáa fult gagn av globaliseringini. Vit síggja bara fyrimunir við at fáa útlendskan kapital at gera íløgur í Føroyum. Eisini um tað er í reiðarí, ið eiga fiskifør. Tað sama er galdandi, tá ið vit tosa um arbeiðsmegina. Vit skulu minnast til, at vit hava føroyskan kapital, sum í hesum døgum roynist heilt væl á kapitalmarknaðum uttanfyri Føroyar. Og okkara arbeiðsmegi hevur meira enn hundrað ár á baki á útlendskum arbeiðsmarknaðum. Gera vit tað trupult hjá kapitali og arbeiðsmegi at koma til Føroya, so medvirka vit til at leggja okkara landsmonnum fótonglar uttanlands. Vit meina í Sambandsflokkinum, at tað átti at borið til – aftan á samráðingar við ES – at funnu eina semju, ið allir flokkar kunnu taka undir við.

*Spyrjari: Hetta ljóðar næstan sum um, at vit fáa eitt paradís á jørð, um vit sleppa øllum marknaðarkreftunum leysum?*

- Nei, so einfalt er tað ikki. Vit vita væl – eisini í Sambandsflokkinum – at vit hava eitt samfelag við sosialum munum. Eg aftri meg ikki við at siga, at stættastríðið er ikki av. Tað eru stórir stættamunir í føroyska samfelagnum. Vit eru ikki bara ein liberalur, men eisini ein sosialt sinnaður flokkur.

*Spyrjari: Hatta eru sterk orð í einum borgarligum flokki. Ikki minst tá ið júst hasin spurningurin – hvørt stættastríðið er av – hevur elvt til hvast orðaskifti í Javnaðarflokkinum, ið plagdi at hava næstan einkarrætt at hjúkla um tey, ið komu at liggja undir í stættastríðnum.*

- Stættastríð er ikki tað, vit vanliga tosa mest um í Sambandsflokkinum. Men Sambandsflokkurin er ein konservativur flokkur í eini tradition, har tað sosiala hevur stóran týdning. Eitt samfelag, har sosialu munirnir sleppa at gerast ov stórir, og tey veikastu í samfelagnum verða slept upp á fjall, er ikki eitt vælvirkandi samfelag. Tað er eitt samfelag, ið lættliga syndrast.

*Spyrjari: Hatta ljóðar næstan sum tann diskussión, sum tók seg upp í bretska konservativa flokkinum; har tað klassiska orðaskiftið um "one nation" mótvegis "two nations" tók seg upp í kjalarvørrini á einskiljingarpolitikkinum hjá Margaret Thatcher. Har "two nations" upp á ein máta er ein viðurkenning av, at eitt samfelag kann koma at líða undir tí at hava ov stórar stættamunir. At tjóðin støkkur sundur í tvær. Í tvær ójavnar stættir.*

- Skulu vit brúka hasa terminologiina, so stendur Sambandsflokkurin fyri einum politikki, ið ikki vil, at tjóðin støkkur sundur. At vit ikki enda sum "two nations".

*Spyrjari: Tað er nógv í verandi politisku støðu, sum snýr seg um júst hetta. Eitt stríð hevur verið í landsstýrissamgonguni, sum Sambandsflokkurin er partur av; stríðið hevur snúð seg um skattalætta, Sandoyartunnil og um hvørt sparingar skulu vera upp á rakstur ella íløgur. Tit hava sum flokkur meldað út, at skúlar og almannamál eiga at verða tikin fram um íløgur. Ella fram um betong, sum tú sjálvur hevur orðað teg í eini samrøðu.*

- Tann ósemja, sum nú hevur tikið seg upp í samgonguni, hevur upp á nógvar mátar verið eitt kærkomið høvi hjá okkum at hyggja okkum sjálvum í eyguni í speglinum og spyrja, hvat ið vit vilja í politikki. Har er eingin ivi í flokkinum, at ábyrgdin, bæði tann fíggjarliga og tann sosiala, eigur at vera í hásæti. Vit mugu og skulu halda aftur, tá ið vit hava ein yviruppphitaðan búskap. Og tá ið vit so gera tað, so mugu vit hugsa sosialt. Tað ber ikki til at koyra á við meira betong, um tað inniber, at fólk skulu sigast upp innan fyri tað almenna. Vit skulu minnast til, at 80 prosent av eini sparing er løn til starvsfólk. So tað gert tú ikki uttan at koyra fólk til hús í stórum tali.

*Spyrjari: Flestu okkara eru ikki forvand við, at ein borgarligur flokkur sum Sambandsflokkurin hevur sovorðnan ampa fyri starvsfólki innan tað almenna. Hvat er broytt?*

- Vit mugu síggja í eyguni, at tað liggur ein stór uppgáva fyri okkum at taka hond um okkara borgarar, ið eldast. Teir koma at viga tungt, tí tann skarin, ið skal tryggja, at tey fáa eitt gott lívskvøld, standa í stað ella minka í tali. Tað bøta vit bert um við at fáa fleiri fólk til landið. Tá verður uppgávan – sum bara kann verða loyst innan tað almenna – í tveimum. Ellisheim og aðrir stovnar til røkt av teimum gomlu fer at krevja sítt. Tað mugu og skulu vit fyrihalda okkum til. Hin uppgávan – og tá tosa vit ikki bara um fleiri herðar at lyfta – hin uppgávan er avgerandi fyri,




*Undirtøkan hjá Sambandsflokkinum á løgtingsvalum síðani heimastýrislógin fekk gildi.*




*Løntakarabólkar í veljaraskaranum hjá Sambandsflokkinum, samanborið við alt landið. (%)*